# TWR – KVINNUR VIÐ VÓN

## *Bønaráheitanir fyri mars 2025 - Norður- Mið- og Suðuramerika*

1. Vit biðja fyri gentum, sum foreldrini hava selt til menniskjahandlarar. Linna líðing teirra og drag tær til Tín, so tær koma at kenna Teg sum ein faðir, ið elskar tær og hevur umsorgan fyri teimum. (Opinberingin 21:4)
2. Harri, vit biðja fyri leiðarunum í Bonaire at teir semjast og vísa ábyrgd, og vit biðja at rættvísi má ráða í stjórnini á oynni. (Orðtøkini 29:2)
3. Jesus, Tú ert okkum ein fyrimynd fyri, hvussu vit kunnu liva eitt lív í kærleika til onnur. Vek trúgvandi í Brasil til at fylgja Tær og hava umsorgan fyri tilflytarum, flóttafólki og teimum lítilsgjørdu. (Jóhannes 13:34)
4. Kvinnur av upprunafólkinum í Kanada liva í nógv størri vanda fyri at verða rændar og dripnar. Harri, verj tær og grøð tær, og broyt hjørtuni á teimum, ið fremja slíkar brotsgerðir. (1. Pætursbræv 3:12)
5. Harri, vit biðja fyri kvinnum í Kili, at tær fáa góðar starvsmøguleikar og rímiliga løn. Lat tær verða virdar fyri síni evnir og sínar førleikar. (Jeremias 22:13)
6. Gud, lat útvarpssendingar og trúartænastur mennast í Kosta Rika, so tær kunnu veita kvinnum, ið hava hjálp fyri neyðini, sálarliga, andaliga og praktiska hjálp serstakliga einligum mammum. (Galatiabrævið 6:2)
7. Harri, vit biðja, at fleiri kvinnur á Kuba koma at kenna Kristus og fylgja Honum og gerast livandi vitni um Hansara kærleika og náði. (Jóhannes 8:31-32)
8. Faðir, troysta tey, ið eru flutt úr Dominikanska lýðveldinum av fíggjarligum ávum. Linna teirra líðing, ið stendts av, at tey eru bæði kropsliga, kensluliga og andaliga skild frá familju og heimi. (Sálmur 34:19 – ensk: 34:18)
9. Harri, í náði Tíni, bein burtur kriminella yvirgangin í Meksiko. Lat fólkið har venda sær til Tín at verða endurreist, troystað og finna tryggleika.(Ápostlasøgan 17:30-31)
10. Harri, lat toymi okkara í Paraguai finna góðvild og náði, sum tey leggja verkætlanir fram fyri stjórnina í landinum og royna at hjálpa sárbarum kvinnum har. (Sálmur 5:13 – ensk: 5:12)
11. Nógvar familjur í Uruguai búgva í húsum uttan vatn og elveiting. Gud, gev leiðarum teirra vísdóm og fígging at byggja dygdargóð hús, serstakliga har børn eisini eru. (Matteus 7:25)
12. Faðir, lat Sannleiksanda Tín hjálpa ungum kvinnum í USA at síggja, at eina í Kristusi er ikki neyðugt at strevast – Hann er keldan til teirra sanna samleika. (Matteus 11:28)
13. Harri, vit biðja fyri trygdini hjá kvinnum í Venesuela, ið uppliva kynsligan harðskap innanhýsis ella at verða útnyttaðar. Frem rætt og endurreising í lívi teirra. (Sálmur 72:14)
14. Harri, vit biðja, at fíggjarstøðan í Bonaire má batna, so fyritøkur kunnu trívast og kunnu veita fólkinum har starvsmøguleikar. (Filippibrævið 4:19)
15. Gud, gev TWR *Kvinnur við Vón* toyminum í Brasil vísdóm og hjartalag, sum tey framleiða tilfar og leggja ætlanir fyri, hvussu tey kunnu menna trúartænastuna og vekja almennan áhuga fyri henni. (Kolossebrævið 1:9)
16. Meginparturin av kynsligum menniskjahandli í Kanada fer fram á "Highway 401 corridor" í Ontario. Harri, vit biðja fyri teimum felagsskapum, ið berjast móti hesi illgerð. (Sálmur 82:3-4)

17. Harri, grøð og styrk kvinnur í Kili, sum stríðast við sjúku, strongd ella ótta í sínum lívi og í familjunum. (Jóhannes 14:27)
18. Gud, lat ungar kvinnur í Kosta Rika lata seg leiða av kristnum virðum, taka skilagóðar avgerðir fyri framtíðina, og stremba eftir, at fullføra sínar lívsætlanir í Gudi. (Filippibrævið 4:8)
19. Harri, gev mammum, kvinnum og lærarum á Kuba tolsemi, vísdóm og tilfar at kunna vegleiða næsta ættarlið. (5. Mósebók 6:6-7)
20. Svik og mutur í stjórnum føra til ruðuleika og kúgan av fólkið. Gud, lat ljós Títt avdúka og beina burtur slík í Dominikanska lýðveldinum, sum fremja og góðkenna slíkan ruðuleika. (Sálmur 7:10 – ensk: 7:9)
21. Harri, lat ljós Títt lata upp hjørtuni á leiðarum í Meksiko, so teir kunnu leiða við Tínum vísdómi og skynsemi. (Orðtøkini 9:10)
22. Nú kvinnur í Villarrica fongslinum í Paraguai fáa frálæru hvønn mánað frá toymi okkara, frels tær og ger, at tær búnast í trúnni. Faðir verj tær fyri monnum, sum eru í sama fongsli. (Orðtøkini 3:29)
23. Harri, lat foreldur í Uruguai fáa góð størv, so tey hava nóg mikið av peningi at forsyrgja børnum sínum. Takk fyri skúlar, ið geva næmingum mat. (Sálmur 145:15-16)
24. Faðir, verj og grøð gentur, sum ganga á fróðskaparsetrum í USA, ið hava verið fyri kynsligum harðskapi ella eru misnýttar kynsliga. Lat eina broyting henda, bæði viðvíkjandi reglugerðum fyri umhvørvinum á setrinum, og í hjørtunum á illgerðar monnunum. (Esaias 60:18)
25. Góði Gud, útvega kvinnum í Venesuela mat, heilivág, og aðrar neyðsynjarvørum, nú landið er í fíggjarligum trupulleikum. (5. Mósebók 15:11)
26. Nú fólkatalið í Bonaire økist er trot á bústøðum, ið fólk hava ráð til. Lat familjur megna at finna ein bústað, ið tær kunnu gjalda fyri og kalla sítt heim. (Sálmur 127:1)
27. Faðir, vit biðja, at alt svik og mutur í Brasil má verða steðgað, so at øll tjóðin verður signað við frælsi og framburði. (Jóhannes 8:36)
28. Gud, lat Anda Tín vegleiða kristnar trúgvandi kvinnur í Kili at tæna sínum samkomum og samfelagi við vísdómi og kærleika, so tær kunnu hava eina jaliga ávirkan á umhvørvið. (1. Jóhannesarbræv 3:18)
29. Harri, lat kvinnur á Kuba savnast í felagsskapi at stuðla hvør aðrari í bøn, vinalagi og praktiskari hjálp. (Ápostlasøgan 4:32)
30. Gud, lat stjórnina, ið tók við í Uruguai í farna mánaði, óttast Teg og søkja Teg um vísdóm at stjórna landinum. (1. Timoteusarbræv 2:1-2)
31. Harri, styrk hjørtuni á troyttum mammum í USA. Lat nærveru Tína og Orð Títt verja tær frá at gerast máttleysar. Tú ert keldan við livandi vatni, sum kann styrkja sálir teirra. (Jóhannes 4:13-14)

***"Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,***

***so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!"***

***Hebrearabrævið 4:16***

# EITT ORÐ UM VÓN

## At grunda yvir hjartastøðu okkara

eftir Lisu Hall, altjóða bønarsamskipara

***Rannsaka meg, Gud, og kenn hjarta mítt, royn meg og kenn hugsanir mínar! Vita, um eg eri á vanlukkuleið, og leið meg hin æviga vegin! Sálmur 139:23-24***

Hvussu handfert tú spentar støður við tey, tú elskar? Hvat gert tú, tá ið tú merkir spenning ella skilnað í vinaløgum? Um vit vilja fáa vinasambandið bøtt og eru semjusøkjandi, er helst neyðugt fyrst at taka okkum tíð til at kanna okkara egna hjarta og hugburð.

Eru vit villug at gera okkum nóg stóran ómak til at endurbøta vinaløgini, hvussu mikið meir er ikki neyðugt at vissa okkum um, at sambandið við Gud er í lagi? Ein loysn, ið eg havi funnið, er, at eg regluliga taki tíð til at hugsa um lív mítt og kanna samband mítt við Gud og við onnur. Eg biði Gud um at rannsaka meg, og eg biði, at Heilagi Andin opinberar fyri mær, hvar hjarta mítt er farið av leið. Hvussu lætt er tað ikki fyri hvønn einstakan okkara at gerast blind av synd í okkara lívi, um hon er djúpt fjald. Tí er tað, at eg elski at biðja til Gud sum vit lesa í *Sálmi 19:13-15 – ensk:12-14*:

> ***“Hvør er varur við, hvussu mangan hann villist! Fyrigev mær loyniligu syndir mínar! Varðveit eisini tænara Tín frá skammiligum syndum, lat tær ikki ráða yvir mær! Tá verði eg lýtaleysur og ikki sekur í stórum misbrotum. Lat orð muns míns og hugsanir hjarta míns líka Tær, HARRI, klettur mín og endurloysari mín!”***

Ásanna vit, at samband okkara við Gud er tað virðismiklasta í lívi okkara, síggja vit týdningin av at hugleiða um tað, sum er farið. Hvørja ferð vit synda, er ein múrur bygdur upp, ið forðar fyri okkara samfelagi við Gud. Mong av okkum hava upplivað hendan múr eftir at hava trætast við okkara maka ella vin. Tá kunnu vit kenna ein skilnað okkara millum.

Men Gud hevur givið okkum eina vakra gávu – fyrigeving fyri syndir okkara við at játta og angra. Ynskja vit at fáa tað inniliga samfelagið aftur við Faðir okkara, kunnu vit taka ímóti hesum høvi, ikki einans at ásanna, hvat tað er, ið ger skilnað okkara millum, men eisini gleðiliga at játta og venda við frá synd okkara, so at samfelagið verður endurnýggjað.

Koma vit við opnum sinni til Gud við einum sonnum hjarta og vilja lata Hann finna okkurt í lívi okkara, ið forðar fyri samfelagnum við Hann, vil Hann virða okkara bøn og náðiríkur vísa okkum tað. Hetta hendi stutt síðani fyri meg, tá ið eg hevði eina langa løtu í tøgn og einsemi við Faðirin.

Eg byrjaði løtuna við at spyrja Gud, hví eg ikki kundi vinna á stoltleika í lívi mínum, og tí at vera fordømandi. Satt at siga var eg troytt av at játta hesar syndir fyri Honum. Tá ið eg byrjaði løtuna í tøgn, var eg bilsin av, at hugsanir mínar fóru aftur til barnaár míni. Í huga mín komu løtur frá harmiligum umstøðum í familjuni.

Eg spurdi Gud um, hví Hann tók hesar støður fram júst nú. Og Hann avdúkaði fyri mær, at tað var har, hin djúpt fjalda rótin av stoltleika mínum og fordøming varð skapað. Av tí, at eg helt, at hesir harmiligu tilburðir einans vóru hendir fyri  onnur í familjuni, men ikki fyri meg, skilti eg ikki, hvørja ávirkan tað hevði á lív mítt.

Og Gud vísti mær, at eg mátti fyrigeva teimum. Eins týdningarmikið var eisini, at eg skilti ikki avleiðingarnar av, at eg í stoltleika fordømdi onnur í familjuni fyri atburð teirra. Í náði síni vísti Gud mær, at atburður mín mótvegis teimum hevði verið syndafullur, og tað hevði verið orsøkin til mínar harðrendu hugsanir.

Faðir mín leiddi meg í mildleika gjøgnum eina tíð, har eg kundi fyrigeva hinum í familjuni, og leiddi meg síðani til at játta og venda við frá míni egnu synd móti teimum. Tað var ein týdningarmikil løta  fyri meg. Og við takksomum hjarta fyri dýrabaru gávu Hansara um fyrigeving, gleddist eg og kundi luttaka í minnismáltíð Harrans við reinsaðum hjarta. Gud broytti hesa harðrendu støðuna í lívi mínum henda dagin. Hann beindi fyri rótini, ið var grivin djúpt niður, og sum eg als ikki hevði varnast.

At taka tíð til at grunda yvir lív okkara er týdningarmikið, um vit vilja loyva Gudi at virka í okkum, so sum Hann ynskir at gera. Vilt tú eins og eg, gera tær tann vana at grunda yvir lív títt, sum vit í eyðmjúkleika bera hjørtu okkara fram fyri Gud?

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

twr WOMEN OF HOPE

***KVINNUR VIÐ VÓN***

***twrwomenofhope.org***

**<u>Fíggjarstuðul:</u>**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia –– twre@twr.org**